## Fiskimálaráðharrar í Norðurlondum hittast

Tann 5. fundurin millum fiskimálaráðharran í Norður Atlantshavinum verður hildin í Ilulissat í Grønlandi í hesum døgum frá 23. til 27. mai 2000. Fiskimálaráðharrar úr Kanada, Grønlandi, Íslandi, Føroyum og Noreg eru við á fundinum. Úr Russlandi og ES luttaka embætisfólk á hægsta stigi. Fiskimálaráðharrafundurin hesuferð hevur 4 høvuðsevni. Tey eru:

1) Hvussu veiðiflotin verður umsitin á burðadyggum grundarlag, herundir minking í samlaða veiðiflotanum og stýring av ovurorku í útflutningi av skipum. Avleiðingar av ólógligum fiskiskapi og óregluligum fráboðanum.

2) Eftirlit og hondhevjing í fiskiskapi.

3) Vistskipanin í havinum og ávirkanin frá súgdjórum.

4) Umhvørvis grundreglur og tillaging í stýringini av fiskivinnuni.

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum hevur í dag havt eitt innlegg um vistskipanina í havinum og um ávirkanin frá havsúgdjórum. Han nýtti høvi til eisini at bjóða Kanada og Russlandi við sum limir í NAMMCO.

## VALUTAKURSIR

| | | 30.05.00 | Ultimo apríl |
|---|---|---|---|
| *USA* | **Dollarar** | 794,2000 | 820,8000 |
| *Bretland* | **Pund** | 1290,6000 | 1286,0600 |
| *Týskland* | **Markur** | 381,5000 | 381,1800 |
| *Svøríki* | **Króna** | 88,6700 | 91,6600 |
| *Noreg* | **Króna** | 89,4800 | 91,5700 |
| *Frakland* | **Frankur** | 113,7500 | 113,6600 |
| *Belgia* | **Frankur** | 18,4970 | 18,4810 |
| *Sveits* | **Frankur** | 474,6800 | 474,7100 |
| *Holland* | **Gyllin** | 338,5900 | 338,3100 |
| *Italia* | **Liri** | 0,3854 | 0,3850 |
| *Finnland* | **Markur** | 125,4900 | 125,3900 |
| *Ísland* | **Króna** | 10,5200 | 10,8500 |
| *Eysturríki* | **Skillingur** | 54,2250 | 54,1800 |
| *Spania* | **Pesetas** | 4,4840 | 4,4810 |
| *Portugal* | **Escudos** | 3,7220 | 3,7190 |
| *Kanada* | **Dollari** | 529,3000 | 555,8700 |
| *Grikkaland* | **Drakmur** | 2,2130 | 2,2180 |
| *Japan* | **Yen** | 7,4325 | 7,7026 |
| *Írland* | **Pund** | 947,4200 | 946,6300 |
| | **Evra** | 746,1500 | 745,5300 |

FØROYA SPARIKASSI


# RESEPTIONISTUR
## *Á HOTEL HAFNIA*

Vit sóknast eftir einum virkisfýsnum og tilkomnum fólki m/k til fast starv í reseptiónini - at byrja sum skjótast

*Umráðandi er, at tú hevur:*
- útbúgving sum reseptionistur ella hollar starvsroyndir innan reseptión-/hotelyrki
- góðar/drúgvar starvsroyndir innan samskifti og tænastu
- málkunnleika í talu og skrift - í minsta lagi enskt, umframt norrønt mál
- góðan kunnleika til teldu og tekstviðgerð

*Arbeiðið krevur, at tær dámar at:*
- arbeiða sjálvstøðugt og við skiftandi arbeiðstíðum, í einum, til tíðir, strævnum arbeiðsumhvørvi
- kenna ábyrgd fyri og taka fulla ábyrgd av tínum arbeiði
- hava fjølbroyttar arbeiðsdagar við kvøld- og vikuskiftisvaktum
- veita tænastu á høgum stigi



Skrivligar umsóknir við prógvum og ummælum skulu vera okkum í hendi skjótast tilber ella innan 9. juni 2000.

Nærri fæst at vita, við at venda sær til:
**P/F Hotel Hafnia**
Att: Ása Johnsdóttir
Áarvegur 4-10
100 Tórshavn
Tel 31 32 33 • Fax 31 52 50
E-mail: asa@hafnia.fo

HOTEL HAFNIA

haan 85 · 31 65 11


# Viðmerkingar:

## Les tað, sum skrivað stendur!

Í farnu viku hevði eg eina grein við heitinum „Feðgar á ferð“. Í gjár kom so Kjartan Hoydal við einum aftursvari, sum hann hevur givið heitið „Petur Reinert var ikki faðir á studningsbúskapinum“. Júst sum yvirskriftin ber boð um, so snýr alt svarið seg um, at Petur Reinert, sáli ikki var faðir at stundningsbúskapinum og hevði ikki politisku ábyrgdina av veðhaldspolitikkinum í áttatiárunum.

Í fyrstu atløgu má sigast, at Kjartan Hoydal rættiliga raffinerað fær tikið seg sjálvan burtur úr mínari grein fyri síðan at seta Petur Reinert inn. Soleiðis kann hann fáa onkran lesara til at halda, at eg brúki mína orku til at viðgera persónar, sum ikki fáa vart seg. Tað er í sjálvum sær sera ódámligt. Men høvuðspersónurin í mínari grein var ikki Petur Reinert, Hann var bert nevndur einaferð og í einum einasta setningi.

Hetta var tað, sum stóð í mínari grein: „ ***Í 1975 kom heildarloysnin, sum løgtingið tók undir við, men arkitektarnir aftanfyri vóru Petur Reinert, sáli og Kjartan Hoydal. Ráfiskagrunnurin var teirra uppfinnilsi.***“

Politiska embætistíðin hjá Petur Reinert var frá 1975 til 1979, og tað sum m.a. hendi í 80´unum, hevði hann onga polirtiska ábyrgd av. Og tað hevur heldur eingin fasthildið, minst av øllum eg sjálvur.

Út frá roknskapinum hjá landskassanum kunnu vit staðfesta, at rakstarstudningurin til okkara høvuðsvinnu frá 1980 til 1990 kostaði góðar 3 milliardir krónur, og at effektiv veðhøld í sama tíðarskeið kostaðu okkurt um 1,6 milliardir krónur. Hetta eru almenn tøl, sum ein og hvør við áhuga kann síggja, eisini Kjartan Hoydal, um hann hevur gloymt tey.

So Kjartan Hoydal tú hevur tikið tær tann rætt at skifta høvuðsleiklutin í mínari grein út. Petur Reinert, sáli var ikki høvuðspersónurin, men Kjartan



Hoydal, sum m.a. sum hægsti embætismaður á økinum sat innaliga í studningsruðuleikanum fyri at brúka tíni egnu orð.

Annars var tað áhugaverda í tíni egnu skriving ímóti greinarøðini hjá Kára Petersen, at tú vildi vera við, at tað vóru kreftir í okkara samfelag, sum vildu fasthalda eina skaðiliga studningsskipan, sum í hesum førinum var ríkisstuðulin. Tú hevur líka sum tikið patent upp á at mótvirka øllum tí, sum hevur við studning at gera. Og títt point var, at ríkisstuðulin var eins skaðiligir fyri okkara samfelag sum studningsskipanin vat fyri okkara høvuðsvinnu, sum m.a. tú sum ráðgevi legði lunnar undir í 1975.

Fremsta planbúskaparliga framtak, sum er kent her á landi, har var tú ein av heilunum. Tað er ein veruleiki, sum hvørki tú ella eg fáa gjørt nakað við. Tí kann tað verða eitt sindur torført at taka teg fyri fult, tá tú nú hevur stillað teg í fremstu røð sum forsprákari fyri fríum og óavmarkaðum marknaðarbúskapi. Og mítt point var júst hetta hamskifti.

Vit áttu at tikið tíni orð fyri fult, tí hvør veit meira um studningar enn júst tú, men vitandi um at „hensigten helliger midlet“ eisini er galdandi í tínum føri, skalt tú eisini takast við ávísum fyrivarni.

Men ein aðru ferð eigur tú leggja teg eftir ikki at leggja øðrum orð í munnin.

**Jóannes Eidesgaard**

## Til teir umvendu

Fyrst av øllum fari eg at takka tykkum báðum, Hans Paula og Rolf, fyri áhugaverd svar. Haldi tó ikki, at eg fekk svar uppá tann einfalda spurningin eg setti tykkum. Uttanumtos og umberingar. Tað var nú heldur ikki væntandi. Áhugaverd eru svarini tó, tí tey lýsa eitt áhugavert tíðarskeið, tá enn broddur var í ungdóminum á politiska vígvøllinum. Satt at siga, so hevði eg altíð virðing fyri tykkara dirvi at leggja navn til alt tað, tit skrivaðu. Tann sami broddurin er nú tíverri horvin. Hvør, ið las úr skrif tunum hjá Mao, og hvør las tær hjá Marx kann verða líkamikið. Merkiligt er tó, at tit finnast at Tjóðveldisflokkinum, tí hann skuldi vera so lítið vinstrahallur, samstundis sum tit siga, at meginparturin av teimum mest vinstrahallu finnast júst í hesum flokkinum.

Eg helt meg spyrja hampuliga og uttan at ákæra nakran, og tí er tað eitt sindur harmuligt, at Hans Pauli skírir meg bæði líkt og ólíkt.



Hetta má sigast at verða blivið eitt keðiligt javnaðareyðkenni, men er kanska nakað hesir nýggju menninir hava drigið inn við sær. Hetta skyldast kanska fortíðina í Keypmannahavn, tá menn gingu í so nógvum bólkum, at neyðugt var at skjóta fyrst og spyrja aftaná.

Grundin til at eg spurdi var sera einføld. Í longri tíð hava fólk í Javnaðarflokkinum í skrift og talu brigdað mótstøðumonnum, at teir hava eina kommunistiska fortíð. Helt tað tí verða uppá pláss at vísa á, at hesir eisini funnust hjá teimum sjálvum. Tí skulu tit hava takk fyri svarini og ikki er neyðugt at skammast. Tak hattin av fyri tí Hans Pauli. Pláss skal verða fyri øllum í hesum kjakinum, sum nú er frammi. Stuttligt er tó at síggja, at meðan tit áður kappaðust um at verða longst til vinstru, so royna tit nú at ákæra hvørannan fyri at vera, og at hava verið kommunist.

Hvussu gongur annars við sosialismuni og sjálvstýrinum. Eru tit komnir nærri málinum, og halda tit flokk tykkara, Javnaðarflokkin, verða meira sosialistiskan nú, enn fyri tjúgu árum síðan. Hvussu sosialistiskt skal samfelagið gerast áðrenn tit loysa.

Vit eru ivaleyst samdir í mongum og serliga væl dámdi mær endan á greinini hjá Hans Paula.

Um fyrrverandi blaðfólk á kommunistiskum bløðum, sigur Dan R Petersen í einum svari til Árna Dahl. ”… ***Og tað fer mær kalt niður eftir rygginum, tá ið blaðstjórin á kommunistablaðnum Fríu Føroyum skrivar um frælsi. Hann má hava etið fimmtumma.”***

Framin ella Fríu Føroyar, tað man ikki verða tann stóri munurin.

Men Hans Pauli sigur í eini grein í Sosialinum í 1998, um slíka skriving, sum hana hjá Dan: ”.. ***at kjakið tá verður óreint og ósakligt, og tá verður roynt at fremja sína politisku søk við at dálka mótstøðumannin heldur enn at viðgera málið, sakina”***

Lítið man verða at ivast í, at tað krevst at verða vítt til veggja í Javnaðarflokkinum. Mær tykir tað tó verða so vítt, at tit neyvan vita av hvørøðrum. Annars er stuttligt, at tit hava havt eina tillagingartíð uppá 28 ár, frá tí tit vunnu tykkum javnaðarfrelsuna, til tit alment komu úr skápinum.

Tað sigst at verða fáur, sum upplivdu fundirnar í Keypmannahavn fyri tjúgu - tredivu árum síðan, sum høvdu væntað at sæð Hans Paula, Rolf og Virgar D. fara hond í hond inn í nýggju øldina.

**Manne Persson**

## Hin illgrunasami Bjørn á Heygum

Hvat vil hesin Bjørn?

Jú, illgrunin er tann, at Bjørn vil ikki hava nakra kanning av Signari á Brúnni. Tí vil hann frá síðulinjuni forpurra málið, nú ein kanningarstjóri er settur. Ein heilt ótrúligur *frekleiki.*

Hann, Bjørn, ætlar at seta teir 13 tingmenninar upp á pláss, sum hava undirskrivað at ein kanning skal setast í verk.

Hetta kemur frá einum persóni, sum er uttan fyri tingsins gátt.

Soleiðis arbeiðir, um eg so má siga, *faðirin* at nýggju stýrisskipanarlógini. At fólk uttan fyri tingið skulu hava størri vald enn tey fólkavaldu umboðini á tingi. – Eg meini tað.

**Dia Ellindsson,**
**tjóðveldismaður,**
**Runavík**


**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**

**www.sosialurin.fo**




# Eingin tagnarskylda er brotin

*Næstformaðurin í kirkjuráðnum í Klaksvík hevur onga tagnarskyldu brotið. Tí hann hevur onga tagnarskyldu, sigur biskupur*

EDVARD JOENSEN

Næstformaðurin í kirkjuráðnum í Klaksvík hevur onga tagnarskyldu. Og tí kann hann heldur ikki bróta nakra slíka, sigur Hans Jacob Joensen, biskupur, í viðmerking til tað, Niels Pauli Danielsen, prestur, segði við Dimmalætting leygardagin.

Niels Pauli Danielsen, sóknarprestur í Norðoya Vestara Prestagjaldi, sigur við Dimmalætting leygardagin, at næstformaðurin í kirkjuráðnum hevur brotið tagnarskylduna, hann sum kirkjuráðslimur hevur. Hetta grundar prestur á, at kona kirkjuráðslimin í Fimmaranum í Útvarpi Føroya hevur úttalað seg um, hvussu nógv fólk ganga í kirkju í Klaksvík.

Men tað ber ikki til, at kirkjuráðslimurin hevur brotið tagnarskylduna, sigur Hans Jacob Joensen, biskupur, í viðmerking. Tí har er eingin tagnarskylda. Tað kann ein og hvør fara í kirkju sunnudag og seta seg at telja, hvussu nógv fólk eru inni. So einfalt er tað.

### Almenn bók

Hjá tí, sum ikki kennir viðurskiftini innan kirkjuna, kann tað tykjast, sum næstformaðurin í kirkjuráðnum í Christianskirkjuni letur leka út, hvat skrivað verður í sjálva kirkjubókina.

Men so er ikki, sigur biskupur. Upplýsingarnir, sum prestur her talar um, kunnu bara vera úr eini protokol, sum liggur í kirkjuni, og sum er púra almenn.

Tað var soleiðis, sigur Hans Jacob Joensen, biskupur, at undanmaður hansara, Eivind Vilhelm, varabiskupur, bað prestarnar skriva upp, hvussu nógv fólk gekk í kirkju, hvussu nógv var til altars, hvør gjørdi tænastu og tílíkt. Hetta var ikki nakað krav, men bara ein áheitan frá varabispi, ið tá var. Tí var tað heldur ikki nøkur skylda hjá prestunum at gera tað, og í summum kirkjum verður skrivað upp, meðan tað aðrastaðni ikki verður gjørt.

Hendan bókin liggur so í kirkjuni og er almenn fyri ein og hvønn at lesa, sigur biskupur. Og tað er ikki so frægt sum neyðugt at vera limur í fólkakirkjuni fyri at fáa atgongd til tað, í bókini stendur.

Tí er tað skeivt fatað, um prestur heldur, at hendan bókin áleggur kirkjuráðslimum tagnarskyldu, sigur biskupur.

Niels Pauli Danielsen, sóknarprestur í Norðoya Vestara Prestagjaldi, hevur ikki hug at gera viðmerkingar til tað, sum hann segði við Dimmalætting leygardagin. Einasta hann vil siga er, at nú er málið lagt fyri kirkjuráðið, og so fer hann at bíða eftir, hvat haðani kemur, sigur hann.



*Tað ber ikki til at bróta eina tagnarskyldu, sum ikki er til, sigur Hans Jacob Joensen, biskupur, í viðmerking til, at Niels Pauli Danielsen, prestur, alment hevur lagt næstformannin í Norðoyar Vestara Prestagjaldi undir at bróta tagnarskyldu í samband við hagtøl yvir kirkjugangarar í Christianskirkjuni*

### Einki útistandandi

Hans Jacob Joensen, biskupur, sigur seg ikki hava nakað útistandandi við nakran prest. Hvørki í Klaksvík ella aðrastaðni, hóast Niels Pauli Danielsen, sóknarprestur sigur, at biskupur nýtir eitthvørt høvi til at sleppa av við summar føroyskar prestar.

Tað einasta, sum verið hevur, sigur Hans Jacob Joensen, er, at nakrir prestar klagaðu hann til Kirkjumálaráðið. Teir fingu ikki viðhald, og so metir hann málið at vera avgreitt.

Millum annað verður onkuntíð sagt, at hann skal liggja í stríði við fyrrverandi fuglafjarðarprestin. Men tað er ikki rætt, sigur biskupur. Teir vóru ósamdir um ávís ting, men eisini tað er avgreitt við avgerð úr Kirkjumálaráðnum, og so er eisini tann sakin liðug, sigur biskupur.

Hinvegin metir hann, at málið um donsku biskuparnar, sum ætlanin var skuldu prædika í Føroyum á hvítusunnu, er heldur klossut avgreitt.

Var tað so, at allir partar vildu, kundi málið verið avgreitt í allari stillheit, uttan at nakað sum helst kjak stóðst av. Men biskupur sigur, at hann hevur ilt við at ímynda sær annað, enn at ætlanin hjá ávísum pørtum alla tíðina var at fáa ósemju burturúr.

Og at leggja seg undir at vilja syndra føroysku kirkjuna heldur Hans Jacob Joensen, biskupur, vera heilt burturvið at viðmerkja yvirhøvur.

Hann harmast annars um, sigur hann, at hetta málið um hesar donsku biskuparnar er endað soleiðis, at fólk fáa fatan av, at tað valdar klandur og stríð innan kirkjugátt. Tí tað ger tað ikki, sigur biskupur.

# Uttanríkisráðharrin á árligari vitjan

*Danski utanríkisráðharrin, Niels Helveg Petersen, kom mánadagin á árligu vitjan sína í Føroyum. Hann fer avstað aftur í dag*

EDVARD JOENSEN

Á vitjan síni í Føroyum hevur Niels Helveg Petersen hitt løgmann, landsstýrið og uttanlandsnevnd løgtingsins. Eisini hevur hann vitjað Oljumálastýrið og Menningarstovuna.

Niels Helveg Petersen segði á tíðindafundi mánadagin, at hann hevði tosað við løgmann og kunnað hann um ymisk uttanríkispolitisk viðurskifti. Samstundis nýtti hann eisini høvi sjálvur at fáa meira at vita um føroysk viðurskifti.

Niels Helveg Petersen segði, at hann hevði fingið væl burtur úr.

Tey evni, sum serliga vórðu viðgjørd, segði uttanríkisráðharrin, vóru viðurskifti Føroya við ES, føroyskar handilsavtalur, umframt at hann sjálvur kunnaði um aktuellu støðuna í ES.

Serliga eru tað samráðingarnar, ES í løtuni hevur við eystur- og miðeuropeisku londini, sum ynskja limaskap í ES.

Umframt hevur uttanríkisráðharrin kunnað føroyingar um danska formansskapin í norðurlendskum samstarvi, og um hvørjar ætlanir Danmark hevur um menning av hesum samstarvinum.

Danmark hevur fingið eitt nýtt útflutningsráð, Danmarks Exportråd, sum heldur til í Uttanríkisráðnum.

-Og tað er sjálvsagt, segði Niels Helveg Petersen, uttanríkisráðharri, at Danmarks Exportråd eisini stendur fult út til taks hjá føroyskum útflutningsfyritøkum at nýta.



*Niels Helveg Petersen, uttanríkisráðharri*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

Um vitjanina á Oljumálastýrinum segði uttanríkisráðharrin, at tað er við stórum áhuga, hann fylgir komandi føroysku oljuvinnuni. Hann hevði merkt sær, at til dømis grøna flaggið hjá BP veittraði í Havn.

Um handilsavtalurnar, føroyingar gera við Russland og Turkaland, segði Niels Helveg Petersen, uttanríkisráðharri, at tær vóru bara at fegnast um.

Hann helt ikki, at føroyingar skuldu ganga frá slíkum avtalum, hóast bæði Russland og Turkaland høvdu ávís ófriðalig umráði innan síni landamørk. Eitt nú kríggjast russar í Chechnia og turkar hava sítt stríð við armenar.

Millum annað varð nevnt, at turkar hava deyðarevsing, og at kurdaleiðarin, Abdullah Oechalan, framvegis hevur ein deyðadóm hangandi yvir sær.

Men vit skulu taka tað sum eitt positivt tekin, segði uttanríkisráðharrin, at turkar hava ikki framt nakran deyðadóm seinnu árini. Annars nevndi hann, at meirilutin í turkisku stjórnini eru fólk, sum persónliga eru í móti deyðarevsing.

Niels Helveg Petersen, uttanríkisráðharri, segði, at Danmark av fullum huga tekur undir við handilsavtalum føroyinga við millum onnur hesi londini.